## Vertshús trossa

Tað gongur væl á arbeiðsplássum í Danmark at halda nýggju roykilógina. Tað staðfestir arbeiðseftirlitið, sum síðani 1. januar vitjað 6.000 fyritøkur um alt Danmark. Men vertshús hava hug at trossa lógina, og tað hevur ført til 150 beinanvegin áleggingar, sum tað verður nevnt. Men hóast hesar trupulleikarnar á vertshúsunum, er Tanja Krabe sera væl nøgd við gongdina. Vit meta, at lógin í tí stóra og heila verður fylgd. Men lógin ásetur, at fyritøkurnar hava ein orðaðan roykipolitikk, og tað mugu tær so syrgja fyri, sigur hon við Politiken.



## Kreppan versnar

Kredittkreppan er ikki longur bert ein subprime húsaláns trupulleiki. Alt meðan húsaprísirnir falla og bankarnir stramma teirra útlánspolitikk, so sakka fólk við góðum ella framúr lánssøgu afturút við sínum húsalánum, bilalánum og kredittkortum skjótari og skjótari, sambært vinnuhagtølum og fíggjarfrøðingum. Økingin í fallandi prime-láns kundum, er ein hóttan móti tí longu framman undan skroypiliga bústaðarmarknaðinum. Skrædlið í húsaprísunum rakar allar lánarar, sigur Mark Zandi, leiðandi fíggjarfrøðingur hjá Moody's, skrivar New York Times.

# Vágbingur svingar seg



*Alex Vilhelm framan fyri »Krambúðini á Gørðunum«, sum hann nú fer undir at byggja út til nærum tað tvífaldað*

*Mynd: Dagfinn Olsen*

**Alex Vilhelm er ein av ungu nýggju vinnulívsmonnunum í Suðuroy, og umframt at byggja út handilin á Gørðunum í Vági, verður handilsbygningur bygdur við ringvegin úti við Bilfríðkan í Havn**

VINNULÍV
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Aldargamli handilin á Gørðunum í Vági skal nú útbyggjast. Tilsamans verður talan um 330 fermetrar aftrat, og tað er næstan ein tvífalding í mun til verandi gólvvídd.

Tað er smápartafelagið D. J. Vilhelm, sum eigur Krambúðina á Gørðunum; teir ognaðu sær handilin undir kreppuni fyri einum fimtan árum síðani. Og nú er virksemið vaksið somikið, at neyðugt er at økja um gólvvíddina við nærum einari tvífalding.

Alex Vilhelm sigur, at gongdin hevur verið so, at neyðugt nú er at byggja handilin út.

Men tað er ikki bara suðuri í Vági, at D. J. Vilhelm hevur stórar ætlanir. Eisini norðanfjørðs eru ætlanir um at víðka um virksemið.

Eitt stykki er planerað við ringvegin úti við har, sum Bilfríðkan heldur til. Á hesum grundstykki verður bygdur ein handilsbygningur, sum skal rúma einari møblasølu og einum matvøruhandli.

- Vit hava ikki lagt okkum fast á, júst hvørji møblamerki, vit fara at selja, men helst verður tað í tí bíligara endanum. Og hvat matvøruhandlinum viðvíkur, verður talan um eitt slag av discount, ella cash-and-carry líknandi handli, sigur Alex Vilhelm

### Lýsingarútgerð

Talan verður um ein 1300 fermetrar stóran handilsbygning, við einum yvirbygningi á 300 fermetrar, sum skal húsa umsitingini.

- Upprunaliga tíðarætlanin miðaði ímóti, at bygningurin skuldi standa liðugur í summar, men helst dregur tað eitt sindur út, so vit skriva helst oktober, áðrenn klárt verður at fara undir virksemið, sigur Alex Vilhelm.

Men hann hevur víðari sjónarring enn sum so.

- Vit komu fram á nakað av upptøkuútgerð herfyri, tá eitt upptøkustudio í Danmark fór av knóranum. Vit kundu fáa upptøkuútgerðina fyri ein rímiligan penga, so vit tóku av, sigur Alex Vilhelm.

Talan er um eina rúgvu av útgerð, sum fylti tveir plattar. Talan er um kompletta útgerð til upptøku og redigering av til dømis lýsingum, men eisini upptøkum til vanligar sendingar yvirhøvur.

- Tað hendir nakað í Suðuroy aftur, og hetta er so enn ein møguleiki at varpa ljós á Suðuroynna, sigur Alex Vilhelm, sum longu hevur tosað við fólk har suðuri, sum vísa stóran áhuga fyri hesum møguleikanum.

- Men enn eru vit so bara komin hartil, at vit testa útgerðina og seta okkum inn í, hvussu hon virkar, sigur Alex Vilhelm.



*Tað er á hesum stykkinum við ringvegin við síðuna av Bilfríðkan, at nýggji kombineraði møbla- og matvøruhandilin skal byggjast*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Klaksvíkar Kommuna I Barnahúsið Margit



**Námsfrøðingi**

**Barnahúsið Margit søkir eftir námsfrøðingi til at byrja 3. mars 2008.**

Starvið er á 30 tímar um vikuna inni í Heystperluni. Vilt tú vita meira um okkum ella starvið, so hygg inn á heimasíðu okkara www.margit.fo ella www.klaksvik.fo

**Umsóknin skal verða okkum í hendi, í seinasta lagi 22. feb. 2008.**

**Barnahúsið Margit**
**Traðagøta 31**
**700 Klaksvík**

csd 458006

Klaksvíkar Kommuna I Nólsoyar Pálsgøta 32 I FO-700 Klaksvík
Tel. 410000 I Fax. 410001 I klaksvik@klaksvik.fo I www.klaksvik.fo